Stø›an undir Knúki var hættislig leygardagin 26. september 1970 kl. 10.59, tá íslandsflogfari› sorla›ist sundur í haganum

SOS Knúkur

Tað er ein øgilig sorlan, tá Fokker F27 fer gravandi niðan gjøgnum hagan. Mold og steinar fara sendandi í allar ættir, og buldrið av trykkluftslangum doyvir næstan skrígginingi og neyðarrópini inni í flogfarinum

BÓKARUMMÆLI
John Johannessen

»Nú hevur D.J. Bærentsen, landsdjóralækni ligi› eina løtu á vøllinum ni›an fyri vraki›. Pínan í búkinum og flagbróstinum er øgilig. Hann fer so smátt at kanna, hvussu vor›i› man vera vi› heilsuni. Armarnir eru heilir, merkir hann. Og beinini eru eisini heil. So merkir hann vi› hondini inn á búkin, og hann er sannførdur um, hvat bagir: Livurin er farin.

So er bara at bí›a hjá Bærentsen, tí so miki› veit hann sum djóralækni, at tá livurin er farin, forblø›ir tú skjótt. So hann tekur pulsin og hyggur at holdinum, ta› eigur skjótt at fara at blikna. Og pulsurin eigur at fjara út. Men eina løtu seinni er puslurin tann sami, og holdi› er ikki blikna› ta› allar minsta. Samstundis hoyrir hann óhugnalig ney›arróp uppi á vrakinum. Ein øgilig sukkan.

– Harragud, her liggur tú og hevur ilt fyri bróstinum og ilt í búkinum, men hetta hevur svarta onki at siga, hugsar hann vi› sær sjálvum. Hann reisir seg og gongur ni›an móti vrakinum,

Tá hann kemur til vraki›, eru tey, sum frægast eru sloppin frá vanlukkuni, longu farin at bera løsta› út úr vrakinum. Har á vøllinum liggur millum onnur Ey›bjørg Mikkelsen. Ma›urin, Tórbjørn, hevur fingi› stóran skelk og er fullkomiliga í ørviti. Stendur bara og rópar á Ey›bjørg og bi›ur hana koma inn í vraki›...«

Spenningssøga

Hetta ljó›ar sum ein spenningssøga, og ta› er ta› eisini. Men hetta er ikki ein av teimum spenningssøgunum, sum kunnu bólkast undir fagrar bókmentir.

Vit tosa um bókina »SOS Knúkur«, sum Grækaris Magnussen hevur skriva› um flogvanlukkuna í Mykinesi í 1970, tá íslandsflogfari› datt ni›ur á veg úr Bergen til Føroya.

Bókin er heilt greitt eitt si›søguligt avrik. Men hon er skriva› solei›is, at hon kann lesast sum ein fiktiv spenningssøga. Tá tú fyrst ert farin at lesa, gevst tú ikki, fyrr enn tú ert li›ugur vi› bókina.

Grækaris byrjar bókina meistarliga »in medias res« - mitt í gongdini. Íslandsflogfari› glí›ur smidliga ni›ur millum sk‡ggini vestan fyri Vágoynna, og lívliga frásøgnin ger, at lesarin kennir ta›, sum hann er vi› umbor› á flogfarinum.

Sum lesari kennir tú næstan vanligu ristingarnar, sum eru í einum flogfari, i› flygur inn til Vágar, tá tú lesur samskifti› millum flogskiparan og torni› á flogvøllinum inni ímillum frálíkar l‡singar av huglagnum umbor›.

Bókin grei›ir eisini ógvuliga livandi frá ymsu persónunum, sum eru vi› í flogfarinum, og teimum, sum eru vi› at bjarga.

Mongu frásagnirnar, sum høvundurin hevur fingi› frá fólki, eru settar saman til eina væl l‡sta søgugongd yvir mongu tímarnar, tey særdu liggja og slø›ast í haganum í Mykinesi, uttan at vita hvar tey eru stødd. Somu mynd fáa vit av bjargingararbei›inum.

Hendan fyrsta bókin hjá Grækarisi Magnussen er heilt greitt ein bók, sum er verd at lesa. Hugtakandi at lesa føroyska si›søgu í búnanum hjá eini spenningssøgu.

Fari› var› beinanvegin undir at hjálpa ney›støddu fer›afólkunum

Tá teir fóru inn í vraki›, sóu teir, at líti› var at gera vi› tey, i› sótu kíla› føst, fyrrenn ambo› vóru komin ni›an úr bygdini at loysa tey vi›

ítróttur

Nr. 233 • leygardagur • 2. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo



Spennandi dupultuppgerð

FLOGBÓLTUR
Tíðindaskriv

Tveir dystir verða leiktir hjá ávíkavist kvinnum og monnum í meistaradeildini um vikuskiftið. Millum hesar eru dystirnir millum ÍF og Fleyr, sum í báðum deildum kunnu hava avgerandi týdning, tó at ávirkanin av hesum verður í hvør sínum enda av stigatalvuni.

Meistaradeild kvinnur

Leygardagur, 02.12.00
Sørvágur, Dráttur-TB
kl. 13.30
Sunnudagur, 03.12.00
Kambsdalur, ÍF-Fleyr
kl. 13.00

Dráttur skal leygardagin royna at fylgja við Mjølni. Dysturin er fluttur av Giljanesi til Sørvágs, so sigast kann, at bæði liðini spæla á útivølli. Dráttur er sera væl fyri, og hevur higartil bara tapt ein dyst í landskappingini. Dráttur skuldi eisini megnað at vunnið á TB, sum hetta kappingarárið ikki hevur klárað seg eins væl og tey undanfarnu.

Sunnudagin spæla ÍF og Fleyr. Hesi liðini dystast saman við TB um 3. plássið í deildini. Fleyr vann fyrra dystin millum liðini, sum var í Gundadalshøllini í Havn. Tann dysturin var javnur, og ilt er at meta um, hvat av hesum liðunum fera at draga longra stráið hesaferð. ÍF hevði ein ógvuliga ringan dag ímótið Drátti seinasta dyst, og tí má annað skinn takast um bak.

Meistaradeild menn

Leygardagur, 02.12.00
Sørvágur, SÍ-Fram
kl. 16.00

Leygardagur, 02.12.00
Kambsdalur, ÍF-Fleyr
kl. 15.00

Fram skal royna at venda skeivu gongdini seinastu dystirnar. Fram hevur tapt tríggjar dystir á rað, og nú hevði ein sigur komið væl við. Tað er tó als ikki sum at siga tað at vinna á SÍ í Sørvági. SÍ hevur ikki fingið nakað stig higartil, so dysturin er ímillum tvey lið í kreppu.

ÍF kann leggja seg á odda í meistaradeildini, vinna teir leygardagin dystin ímóti Fleyr. Fleyr hevur eisini nógv at spæla fyri. Liðið var í serflokki seinasta kappingarár, men higartil hava avrikini verið misjøvn. Teir taptu fyrra dystin ímóti ÍF 3-0 so her er nakað at hevnað.

Stór innandurakapping í Havn

Eftir at HB fyri tveimum vikum síðani hevði sína innandurakapping í heyst, eru tað nú grannarnir úr B36, sum eru vertir, tá sonevnda Nósakappingin verður leikt

INNANDURA
Jákup Mørk

Líkt er til, at tað aftur er vorðið meira enn vanliga væl umtókt millum føroyskar fótbóltsungdómar at taka lut í innandurakappingum.

Innandurafótbólturin var at kalla í vælmaktini í fram til miðskeiðis av áttatiárunum, men fram móti endanum av hesum, og meðan kreppuárini vardu, tóktist áhugin at vera nakað minni. At áhugin var minni, er kanska í so nógv sagt, tí minkandi fólkatalið hevur ivaleyst eisini gjørt sítt.

Nú er tó vent í holuni. Føroyski búskapurin er í framgongd, fólkatalið økist, og hetta sæst eisini aftur í tilmeldanini til innandura fótbóltskappingarnar. Til kappingina, sum B36 hevur um vikuskiftið, eru ikki færri enn 95 lið meldað til, og eru fyrireikararnir sera væl nøgdir um hetta.

Landsliðið luttekur

Sum eitt ískoyti til sjálva kappingina, hevur B36 eins og í fjør fingið tey bæði havnarliðini, HB og B36, og so A-landslið okkara at luttaka. Fimm leikarar umboðað hvørt av hesum, og fara tey at dystast beint eftir smápiltafinaluna, sum verður leygardagin kl. 15.30.

Eftir dystin fara teir fimtan leikararnir at tveita troyggjur sínar út til áskoðararnar, og so ræður bert um at kvika sær.

Eisini fer ein Nósi at spáka millum børnini, tá landsliðið spælir, og sum vit hava skilt tað, so fer hann at bjóða eitthvørt søtt til børnini.

Almenn bridgekapping

Leygardagin 16. desember skipar Bridgedeild Kaggans fyri almennari gásakapping

BRIDGE
Tíðindaskriv

Í fjør royndi Bridgedeild Kaggans at gera eina einkultmanskapping, og eydnaðist henda somikið væl, at kappingin verður endurtikin í ár.

Spælt verður leygardagin 16. desember kl. 13.30 í Bridgehúsinum. Væntandi verður kappingin liðug uml. kl. 18.30-19.00, soleiðis at øll tey, ið skulu til jólaborðhald ella annað seinni á kvøldi, eisini hava møguleika at luttaka.

Vinningarnir verða góðir, gás, dunna og vín – so her er ein góður møguleiki hjá øllum bridgespælarum at hugna sær eina løtu. Tá hetta er ein almenn einkultmanskapping er ikki neyðugt at hugsa um makkara, men bert at tekna til, antin við at ringja til Róa á R. Joensen tlf. 319419, Eyðun Joensen tlf. 424479, ella við at skriva seg á listan í Bridgehúsinum. Hetta er eitt serliga gott høvi at royna seg hjá teimum, ið júst eru byrjaði at spæla bridge, ella kanska ikki hava tær nógvu royndirnar, tí tað verður spælt við ymsum makkarum.